


www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 10 - 2011

# Møkster byggir og skal hava meiri fólk

Norska frálandareiðaríið Møkster hevur verið kent sum eitt reiðarí, ið hevur dúvað upp á eldri og umbygd fiskiskip, men ta seinastu tíðina hevur felagið gjørt stórar íløgur í nýggj og nútímans veitingarskip. Sjálvt byggir Møkster tvey veitingarskip á Solstrand-skipasmiðjuni fyri tilsamans 750 milliónir krónur. Tað fyrra varð latið eigarunum í gjár, og tað seinna verður liðugt til várs. Skipini hava sera rúmligt arbeiðsdekk og eru væl útgjørd til bjarging og til at taka olju upp av sjónum. Samstundis byggir ein skipasmiðja í India tvey veitingarskip til eitt felag í Bergen, men tað verður Møkster, sum skal reka skipini og útvega teimum sáttmálar. Nú Møkster fær fleiri skip, er felagið farið at leita eftir fólki at manna tey. Sum skilst skal felagið hava knappliga 130 fólk afturat. Tey bæði skipini, sum eru bygd í Noregi, skulu hava norska manning, meðan tey, sum verða bygd í India, skulu hava norskar yvirmenn og eysturevropeiskar dekkarar, skrivar Aftenbladet.